P/f POUL MICHELSEN

## Goymslufólk søkist

Á seinnapartsvakt okkara er eitt starv leyst at søkja hjá einum røskum, álítandi og fyrikomandi fólki.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av ordrum, útkoyring og annað goymsluarbeiði.

Vaktin er frá mánadegi til hósdag
frá kl 14. til umleið kl. 23-24

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur stóra koyrikortið.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum/prógvum skal sendast til:

**P/f Poul Michelsen**
Postrúm 200
FO-110 Tórshavn.

Um spurningar eru um starvið, ber til at ringja til Bjarna Arnason, goymslustjóra, á 59 46 91.

**P/f Poul Michelsen**

*P/f Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1974. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. Virksemið er í støðugum vøkstri, og tí verða vørumóttøku og - útkoyringsparturin og goymslan sjálv bygd út í løtuni. PM er skipað í 5 deildir: Sølu-, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og útkoyringsdeild. Á goymsluni og í útkoyringini starvast íalt 15 fólk. Hjá PM starvast íalt 50 fólk.*



## Krøv um skráseting av flogfenaði

Við heimild í §9 í Djóraverndarlógini, løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur, áleggur Heilsufrøðiliga Starvsstovan øllum kommunum at skráseta hvør hevur flogfenað í kommununi.

Skrásetingin fevnir um navn, bústað, slag og tal av flogfenaði. Tað er tískil ábyrgd hjá øllum borgarum í Tórshavnar kommunu, ið hava flogfenað at boða Snarskivuni tlf. 302010 frá hesum.

**Tórshavnar kommuna**

## Tilfar til sølu

Grót, nevagrót, 0-75 og 0-25 er til sølu av arbeiðsøki í Havn.

ARTICON **tlf. 350 700**

**Heimarøktin**
*Sandoyar Øki*

## Heimarøktin Sandoyar Øki søkir eftir summarfrítíðar-avloysarum

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsu/heimahjálpum í tíðarskeiðnum 1. juni til 31. august.

Heimarøktin Sandoyar Øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlisrøkt og rakstur er samskipað.

Starvast verður í skiftandi vaktum bæði inni á bústovnunum og úti í Heimarøktini.

Størvini verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 213890 ella 361749.

Umsókn við avriti av autorisatión, prógvum v.m. verður at senda til

**Heimarøktina · Sandoyar Øki,**
Áargarður
210 Sandur

Umsóknarfreist: 20. apríl 2006.

## Fólk til rottangatænastuna hjá IRF

Søkt verður eftir fólki til rottangatænastuna hjá IRF, at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðið umfatar:**

I. Tøming av rottangum í IRF-økinum og í Tórshavnar Kommunu.
II. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

**Krøv til umsøkjaran:**

I. Stóra koyrikortið og vanur at koyra lastbil.
II. Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Galdandi sáttmáli:** Lønarsáttmáli fyri fastløntar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. apríl 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF, tlf. 473300, Adelbert Ellingsgaard.

IRF Postboks 39
Leirvík

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Heimarøktin**
*Sandoyar Øki*

## Heimarøktin Sandoyar Øki søkir eftir starvsfólki til aktivering av eldri á bústovnum

Eitt starv sum avloysari fyri ítrivsvegleiðara í tíðarskeiðnum 1. apríl 2006 til 31. desember 2007 er leyst at søkja.

Arbeiðstíðin er gerandisdagar og verður løgd til rættis eftir avtalu við økisleiðaran.

Heimarøktin Sandoyar Øki er ein skipan, har heimarøkt, røktarheims- og sambýlisrøkt og rakstur er samskipað.

Í skipanini eru tríggir stovnar og verður arbeiðstíðin býtt sundur á allar tríggjar stovnarnar.

**Førleikakrøv:**

- ítrivsvegleiðari, heilsurøktari, ergoterapeutur ella onnur viðkomandi útbúgving
- hug og hegni at starvast við eldri fólki og at samstarva við ymiskar fakbólkar
- kann tilrættaleggja aktivering í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkara
- kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**

- Eitt spennadi og mennandi starv har arbeitt verður tvørfakligt.
- Eitt starv við skiftandi avbjóðingum.
- Eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Lønar- og setanartreytir.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 36 17 49 og 21 38 90.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktina · Sandoyar Øki,**
Áargarður
210 Sandur

Umsóknarfreist: 20. apríl 2006.

HKJ CONTRACTOR
Vit átaka okkum sethúsabygging
HKJ Contractor
TEL 22 70 06